Einasta blaðið 5 ferðir um vikuna

tíðindablaðið
# sosialurin

Telefon 11820 Telefax 14720

Tíðindi, lýsingar, sjónarmið, orðaskifti, myndir – bert ein partur av tí, tú finnur í blaðnum...

## veðrið

Hatrvstið, ið er avegis evsturvvir undan Vesturirlandi, elvir til lytt luftrak vestaneftir móti Føroyum. Fleiri lagtrýst reka næstu dagarnar í landnyrðing gjøgnum Danmarkarsundið norður um Ísland og víðari móti Norðurskandinaviu. Tilsvarandi brúgvalog rokka Føroyum vestaneftir seinast í vikuskiftinum.

### Mikudagin & hósdagin



Millum gul og stívt andøvsgul, 5–10 m/s, av vestri og útsynningi, ódrigið, okkurt ælið, annars tolubgt ella gott sýni. Hitin millum 5 og 8 stig.

### Fríggjadagin & leygardagin

Fríggjadagin friskandi til millum stívt andøvsgul og hvassan vind, 10–15 m/s, av suðri, leygardagin upp í stívt andøvsgul, undir 10 m/s, framvegis lagt, adrigið, men helst turt og gott sýni. Hitin uml. 5 stig.

### Sunnudagin

Friskandi til millum stívt andøvsgul og hvassan vind, 10–15 m/s, av suðri og útsynningi, nakað adrigið, men turt og gott sýni, to móti kvøldi meira adrigið, og kanska regn vestaneftir og vanaligari sýni. Hitin millum 5 og 10 stig.



*Árni Olafson her saman við enska samráðingarleiðaranum David Anderson, løgmanni og Anthony Layden frá bretsku sendistovuni í Danmark. Mynd jan*

*Árni Olafson, leiðari í marknasamráðingum:*

# Tíðin ikki búgvin til nýtt samráðingarumfar

*– Eg hevði vónað, at vit fingu eina avkláring fyri jól ella stutt eftir tað, men tað skuldi ikki blíva so sigur Árni Olafson, sum ikki er førur fyri at seta dato á, nær samráðingarnar við bretar verða uppafturtiknar. Hann vil annars hvørki vátta ella avsanna leysatíðindi um, at tað er komið vátt í reiðrið millum okkara samráðingarnevnd og myndugleikarnar í Føroyum.*

Jan Muller

Eg havi samband við David Anderson, leiðara av tí bretsku samráðingarnevndini av og á, men vit hava ikki hildið, at støðan er búgvin til at avtala ein nýggjan fund millum partarnar

Hetta sigur Árni Olafson, leiðari av føroysku nevndini, ið samráðist við bretar um ásetan av einum undirgrundarmarki nú fundurin, sum skuldi vera í desember, varð útsettur

Uppá fyrispurning hvat skal til fyri at støðan verður búgvin, um tað er soleiðis at vit skulu koma við einum nýggjum atspæli ella um vit bíða eftir einum útspæli frá bretskari síðu sigur Árni Olafson, at tað beint í løtuni ikki bera til at seta tingini upp uppá tann mátan

Árni Olafson hevur onga viðmerking til leysatíðindini um, at tað skal vera komið vátt í reiðrið millum hann og landsstýrið um, hvussu vit best loysa marknatrætuna við bretar

*Men hvar liggur so bølturin í løtuni, hjá okkum ella hjá bretum?*

Tað ætli eg mær heldur ikki at gera viðmerkingar til

Árni Olafson, sum júst hevur verið í Føroyum og luttikið á fundi í oljuráðleggingarnevndini, váttar, at hann eisini hevur nýtt høvi undir hesi vitjan at tosa við teir føroysku myndugleikarnar, sum hava við marknasamráðingar at gera

### Leiðari í trý ár

Tað eru nú trý ár gingin síðani at avgjørt varð at seta Árna Olafson til burturav at taka sær av marknasamráðingunum. Hann starvast annars í danska uttanríkismálaráðnum sum serkønur í føroyskum viðurskiftum

Nú eru so gingin trý ár síðani Árni Olafson átók sær starvið sum formaður í føroysk/donsku sendinevndini. Enn eru vit ikki rokkin á mál og vit spurdu hann, um nøkur broyting verður gjørd í nevndini, at hann verður skiftur út ella um danir t.d. aftur vilja átaka sær lutin at leiða samráðingarnar

Tað dugi eg ikki at siga. Ein avtala er millum landsstýrið og uttanríkisráðið ummitt arbeiði, og tað er so longt nakrar ferðir. Hvussu verður nú í framtíðini dugi eg ikki at siga

### Danski uttanríkisráðharrin vitjar

Uppá fyrispurning um vitjan hjá danska uttanríkisráðharranum í Føroyum á Grækarismessu hevur nakað við naggatíðnina í samráðingunum at gera sigur Árni Olafson, at henda vitjan skuldi longu havt verið og annars er primera málið at viðgera ES

Men tað er greitt, at tá løgmaður og uttanríkisráðharrin hittast, so er tað eingin ivi um, at teir fara at tosa um markið eisini

*Ber tað ikki til at siga, nær ein loysn í marknatrætuni er í eygsjón?*

Eg hevði vónað, at ty klaringin fór at koma fyri jól ella stutt eftir. Men so skjótt skuldi tað ikki ganga

*-Men verður tað áðrenn veturin kemur og landsstýrið skal til at stykkja út øki við Føroyar at lata oljufeløgunum at bora á?*

-Tað er greitt, at spurningurin um útbjóðing av økjum má í hvussu er hava eitt ávíst samband við, hvussu tað stendur til við marknamálinum

*Marknaðosemjan snýr seg um eitt rættiliga stórt øki, ið er millum fleiri lond.*





## Vestfalskyrrindi

29. februar: Mánin longst frá jørðini
5. mars: Fullmáni
12. mars: Seinna kvarter
16. mars: Mánin næstur jørðini

| Dato | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 mar | 0714 | 1934 | 0914 | 2134 | 0529 | 1749 | 0729 | 1949 | 0614 | 1834 | 0629 | 1849 |
| 7 mar | 0755 | 2015 | 0955 | 2215 | 0610 | 1830 | 0810 | 2030 | 0655 | 1915 | 0710 | 1930 |